AGANEVNDIN

KÆRA 10/2008

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra um brúk av ólógligum leikara í B36, 2. deild menn í dystinum B36-TB 20. apríl 2008** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: 20. apríl 2008 | Kæra innkomin: 19. mai frá Starvsnevnd FSF's |
| Kærugjald goldið: | Kærufreist hildin: |
| Partshoyring við 5 daga freist: | Starvsnevndin biðin um ummæli: nei |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: Nei |

# AGANEVNDIN

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

Starvsnevnd FSF's hevur heitt á Aganevndina um at viðgera málið um brúk av ólógligum leikara í B36-hópinum í dystinum móti TB, 2. deild menn hin 20. apríl sum kærumál og at taka málið upp til avgerð.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5 litra d kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's.

Sambært grein 7, stk. 2 í agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's "nær sum helst viðgera eitthvørt mál, sum kemur til henna kunnleika og sum er fevnt av grein 2, og biðja aganevndina um at viðgera málið sum kærumál".

Niðurstøðan er tí, at Starvsnevndin hevur heimild at leggja umrødda mál fyri Aganevndina og at vanligu kærufreistirnar ikki eru galdandi í slíkum málum.

**3. Fakta í málinum**

Umsitingin hjá FSF gjørdist varug við, at leikaraloyvið hjá umrødda leikara til at leika vaksnamannafótbólt formliga liggur í øðrum felag og ikki hjá B36, sum viðkomandi leikti dyst fyri. Kappingarnevndin hevur staðfest, at leikarin hevði undantaksloyvi at leika við unglingunum hjá B36, men at leikaraloyvi at leika vaksnamannafótbólt liggur hjá fótbóltsfelagnum Undrinum. Kappingarnevndin hevur móttikið frágreiðing frá B36 í málinum. Í frágreiðing síni ásannar B36 at tað er eitt mistak at leikarin leikti við 2. deildarliðnum ímóti TB og at felagið fer at góðtaka fylgjurnar av mistakinum.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 14 og 15 í kappingarreglunum fyri fótbólt er aðalregalan at tað krevst leikaraskráseting og loyvisbræv eftir flyting ímillum feløg fyri at ein leikari skal roknast sum lógligur leikari fyri felagið.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

At gera brúk av leikara í 2. deild menn, hvørs leikaraloyvið til vaksnamannafótbólt liggur í øðrum felagið, er brot á regluverk FSF's.

**6. Niðurstøða**

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av

ólógligum leikarum er sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin. Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Aganevndarreglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikarum er álvarsamt brot á lógarverk FSF's og ta skipan, ið er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8 í Agareglugerðini verður B36, 2. deild menn dømt **at tapa** dystin móti TB hin 20. apríl fyri brúk av ólógligan leikara við málmuninum 0-0, sbr. grein 40 í Kappingarreglum FSF's.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Upplýst verður, at sambært grein 12 í Agareglugerðini kann avgerðin um, at B36, 2. deild menn skal tapa dystin, kærast til Yvirkærunevndina. Kærast skal innan 5 dagar eftir at úrskurðurin er móttikin.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 29 / 05 - 2008**

Anni á Hædd

Anni á Hædd, formaður